# Skal bara spælast

**FLOGBÓLTUR** Dysturin í Kollafirði í kvøld millum KÍF og ÍF fær onga týðandi ávirkan á støðuna í Eikliguni hjá kvinnum

Hilmar Jan Hansen

Kappingin í flogbólti hjá kvinnunum er nú komin so langt, at bara eitt umfar er eftir. Fyrsti dysturin av teimum síðstu fýra verður í Kollafirði í kvøld, tá KÍF tekur ímóti ÍF.

Hvørki KÍF ella ÍF kann flyta nakran serligan veg á stigatalvuni, so hetta er bara ein av dystunum, ið skal fáast frá hondini.

Hinir tríggir dystirnir verða spældir sunnudagin, og tá snýr tað seg bara um, um Fleyr ella Mjølnir skal enda ovast í landskappingini.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Annika skaddi hondina

**HONDBÓLTUR** Longu beinanvegin í dystinum millum Tjaldur og StÍF í gjárkvøldið fekk Annika Thomsen hjá Tjaldri skaða í hondina. Enn er ikki greitt, um talan er um brot

Hilmar Jan Hansen

Hendingin, ið elvdi til skaðan, var longu í fyrsta minutti. Annika Thomsen og ein spælari hjá StÍF fóru um koll og onkursvegna kom hondin hjá Anniku at liggja undir. Beinanvegin var greitt, at hon ikki fekk spælt víðari, og nú er spurningurin bara, hvussu álvarsligan skaða, hon hevur fingið.

Sum skilst, høvdu tveir læknar hugt at hondini í gjárkvøldið, men teir vóru ymsir á máli. Annar helt, at hon var brotin og hin helt ikki, at tað var so illa vorðið. Men enn er so ikki greitt, um talan er um brot ella annan skaða.

Í øllum førum kemur tað stak illa við hjá Tjaldri, um hetta merkir, at Annika Thomsen ikki verður við í teimum fýra írestandi dystunum, nú kappingin við Stjørnuna og Neistan er harðari enn nakrantíð, tí bara tvey av hesum trimum liðunum koma í FM-finaluna.

Frammanundan er liðið hjá Tjaldri skert, tí Cornelia Rimbu er nú givin og fór fyri viku síðani av landinum aftur. Hon fekk ein skaða í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini ímóti Neistanum fyrst í januar mánaði og er ongantíð ordiliga komin fyri seg aftur, hóast hon hevur roynt nakrar ferðir, eitt nú í løtum í steypafinaluni.




*Annika Thomsen hjá Tjaldri skaddi sær hondina beinanvegin í dystinum ímóti StÍF í gjárkvøldið, og í fyrsta umfari er ivasamt, um hon spælir meira hetta kappingarárið*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

## Dupult mansverja

Hendingin við Anniku skakaði Tjaldur ta fyrstu løtuna í dystinum í Runavík í gjárkvøldið, men ikki meira enn so, at verjan megnaði at halda tætt fyrstu 10 minuttirnar, tá StÍF einki mál fekk.

Strandakvinnur mansvardu Adinu Petrea allan dystin á tamb, og miðskeiðis í fyrra hálvleiki valdi so Tjaldur at gera tað sama og taka Rebekku Justinussen burturúr. Allíkavæl blivu tær báðar toppskjúttar hjá liðum sínum, men fingu báðar fleiri mál við brotskøstum.

Allan dystin var Tjaldur eitt fitt petti frammanfyri, og sum tað leið út á seinna hálvleik bara øktist munurin. Síðstu 10 minuttirnar tók Tjaldur sær meira av løttum, og tá nærkaðist StÍF eitt sindur, men ongantíð so mikið, at tað á nakran hátt hótti heimaliðið og sigurin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

### Tjaldur-StíF

30-21 (15-9)

Dómarar: Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

**Tjaldur:** Adina Petrea 9 (3), Simona Petersen 7, Beinta Joensen 5, Sarah Ann Thomsen 3, Benadikta Johannesen 2, Heidi Sevdal 2, Jóhanna í Króki 1, Annsy Sevdal 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 6 (2), Fríðrún Danielsen 5, Birna Tummasardóttir 5, Bára Berthelsen 3, Lilja Gregersen 2
Brotskøst: Tjaldur 5, StÍF 4
Útvísingar: Tjaldur 5, StÍF 4

# Ítróttur í kvøld:

**EIKLIGAN, KVINNUR**

16/03 .......... 18.00 .......... KÍF - ÍF

**SUNSET-KAPPINGIN**

16/03 .......... 18.30 .......... VÍF - Stjørnan
16/03 .......... 18.30 .......... Kyndil - Neistin

**ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN**

16/03 .......... 19.00 .......... H71 - StÍF
16/03 .......... 20.00 .......... VÍF - Team Klaksvík
16/03 .......... 20.00 .......... Kyndil - Neistin

### Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 20 | 17 | 3 | 54 | 20 | 34 | 23 |
| 2 | Mjølnir | 20 | 17 | 3 | 55 | 14 | 41 | 22 |
| 3 | SÍ | 20 | 15 | 5 | 49 | 26 | 23 | 19 |
| 4 | ÍF | 20 | 11 | 9 | 39 | 34 | 5 | 14 |
| 5 | TB | 20 | 9 | 11 | 34 | 42 | -8 | 11 |
| 6 | Ternan | 20 | 5 | 15 | 22 | 49 | -27 | 7 |
| 7 | KÍF | 20 | 4 | 16 | 17 | 54 | -37 | 5 |
| 8 | Dráttur | 20 | 2 | 18 | 25 | 56 | -31 | 3 |

### Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 20 | 573 | 468 | 105 | 32 |
| 2 | Stjørnan | 19 | 538 | 442 | 96 | 32 |
| 3 | Neistin | 20 | 561 | 459 | 102 | 30 |
| 4 | VB | 20 | 502 | 498 | 4 | 20 |
| 5 | Kyndil | 20 | 460 | 490 | -30 | 14 |
| 6 | VÍF | 19 | 423 | 533 | -110 | 7 |
| 7 | StÍF | 20 | 398 | 565 | -167 | 3 |

### Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 20 | 707 | 552 | 155 | 39 |
| 2 | KÍF | 20 | 571 | 521 | 50 | 26 |
| 3 | VÍF | 20 | 565 | 527 | 38 | 21 |
| 4 | Kyndil | 20 | 512 | 525 | -13 | 19 |
| 5 | H71 | 19 | 519 | 507 | 12 | 18 |
| 6 | StÍF | 20 | 516 | 528 | -12 | 13 |
| 7 | Team Klaksvík | 19 | 451 | 681 | -230 | 2 |

# Fimm dystir í kvøld

**HONDBÓLTUR** Tveir kvinnudystir og ein mansdystur eru á skránni hjá teimum bestu í hondbóltinum í kvøld

Hilmar Jan Hansen

Eftir sigurin hjá Tjaldri í gjárkvøldið skulu Stjørnan og Neistin í kvøld fylgja við. Stjørnan skal til Vestmanna at spæla ímóti VÍF og Neistin er partur av grannauppgerð ímóti Kyndli.

Við sigri kann Stjørnan aftur fara fram um Tjaldur og leggja seg á odda í Sunset-kappingini, og Neistin kann koma upp á sama stigatal sum Tjaldur, men við einum dysti meira.

Í Atlantic Airways-kappingini hjá monnunum eru tríggir dystir í kvøld. VÍF tekur á heimavølli ímóti Team Klaksvík og kann tá aftur nærkast KÍF, sum undan dystinum er fimm stig frammanfyri og á finalukøs.

Í hinum báðum dystunum er talan um grannauppgerð millum Kyndil og Neistan, og eisini spælir H71 á heimavølli ímóti StÍF.

*hilmarjan@sosialurin.fo*